# ítróttur

Nr. 46 • leygardagur • 6. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# Trýstið er nú á VB

**Eftir at Stjørnan vann sín dyst í Vestmanna, er tað skorið út í papp, at VB ikki hevur ráð at snáva**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er framvegis lagt upp til, at talan verður um sannan finaludyst, tá kvinnurnar hjá VB taka ímóti Stjørnuni á næst seinasta leikdegi.

Men eftir sigurin hjá Stjørnuni í Vestmanna mikukvøldið stendur greitt, at tað er VB, sum hevur truplastu leiðina fram til hetta.

Eftirverandi dystarskráin hjá Stjørnuni – tá sæð verður burtur frá VB-dystinum – er nevnliga alt annað enn ræðandi. Stjørnan skal fram til hetta spæla heima móti Kyndli og úti móti Søljuni. Síðani kemur útidysturin móti VB, áðrenn rundað verður av við heimadysti móti Neistanum. Ein dystur, sum kanska kann arga nakað.

Hjá VB er í so máta eitt sindur øðrvísi. Hetta vikuskiftið vitja tær í Havn, har Neistin helst ætlar at gera ein vørr, og síðani er talan um heimadyst móti VÍF, sum helst framvegis vil spæla við, hóast talan nokk bara verður um heiðursmerki úr silvuri. Síðani er útidystur móti StÍF, áðrenn brakið móti Stjørnuni, men skal talan verða um brak, so krevst full úrtøka fram til hetta.



*Einki er at ivast í, at trýstið nú liggur á VB. Eftir sigurin hjá Stjørnuni mikukvøldið hevur VB ikki ráð at missa nakað sum helst komandi vikurnar*

### Søljan kann loysa

Og sum sagt, so er fyrsta royndin nú leygardagin, tá tær vitja í Havnini. Einki er at ivast í, at á pappírinum er tað VB, sum hevur betra liðið, og hevur liðið ein av sínum góðu døgum, so er einki at ivast í, hvønn veg stigini fara.

Neistin hevur hinvegin av og sveiggjað seg upp til nøkur sera góð avrik. Ikki minst seinasta dystin í grundspælinum, tá tær í Vági vunnu á VB, og júst tann sigurin kann kanska geva Neistakvinnunum mót til uppgávuna hetta vikuskiftið.

Sum nevnt omanfyri, so skal Stjørnan sunnudagin spæla heimadyst móti Kyndli, og har er einki at ivast í, at tvey trygg stig bíða. Stjørnan má so vera Katarinu Stepanov fyriuttan, men tað er einki at ivast í, at hetta ikki fer at nerva tað heilt stóra sunnudagin.

Tá spæla Søljan og StÍF eisini á Giljanesi, og tá er spurningurin, hvørt StÍF eftir sigurin á Kyndli kann lyfta seg enn longur, ella um Søljan hinvegin megnar at staðfesta munin, sum hevur verið niður til Kyndil størsta partin av árinum.

# Neistin móti oddinum

**Vinna teir bláu heimadystin móti KÍF leygardagin, fara teir upp um Kyndil í oddastríðnum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir at teir mest sum alt árið hava stríðst fyri at hanga í oddinum, hevur Neistin nú møguleikan at toga seg fram um grannarnar úr Kyndli. Partvíst syrgdu teir sjálvir fyri hesum við sigri á StÍF seinasta sunnudag, og partvíst fingu teir so hjálp frá júst strandingunum, tá hesir mikukvøldið vunnu á Kyndli.

Leygardagin tekur Neistin móti KÍF, og á pappírinum er her eingin ivi um, at tað er bláa havnarfelagið, sum er favoritturin. KÍF hevur tó fleiri ferðir havt hug at arga fremru liðini, og er lagið hitt rætta, so er einki at ivast í, at teir kunnu geva Neistanum ein sera skarpan gang.

Tað telir tó skeiva vegin hjá KÍF, at teir hesaferð mugu vera tveir leikarar fyriuttan. Bæði Petur Martin Poulsen og Kristian Madsen fingu beinleiðis reytt í dystinum móti VÍF seinsta vikuskifti, og tí eru teir ikki við í hópinum leygardagin.

### VÍF kann eisini

Sunnudagin verður so dystur í Hoyvíkarhøllini, har VÍF kemur á vitjan.

Vestmenningar tykjast langt um leingi at hava funnið rætta stevið, og vinna teir aftur hesaferð, er talan um triðja sigurin á rað. Samstundis kunnu teir lyfta seg somikið langt upp, at tað bert eru tvey stig upp til oddin, og við eftirverandi dystum móti bæði Neistanum (heima) og Kyndli (úti) kann hondbóltsfepurin í bygdini brádliga gerast væl hægri, enn hann hevur verið líka síðani fyrra hálvleik av seinasta dystinum móti StÍF fyri knøppum ári síðani.



*Vestmenningar hava ikki tosað um gull í langa tíð, men verður talan aftur um sigur sunnudagin, mugu teir av álvara roknast við í hesum høpi*





# Mjølnir kann staðfesta

**Kvinnurnar hjá Mjølni kunnu nærum við vissu rópa seg meistarar, um tær vinna dystin á Giljanesi um vikuskiftið**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er einki at ivast í, at hópur av klaksvíkinguum fer at leggja leiðina í Vágoynna sunnudagin.

Bæði kvinnur og menn hjá Mjølni skulu spæla dystir, sum lættliga kunnu gerast avgerandi fyri gullmerkini, og serliga hjá kvinnunum er spenningurin stórur.

Júst Dráttur var liðið, sum av álvara spældi trumfin í gullstríðnum yvir til Mjølnir, tá tær vunnu heimadystin móti TB, og nú er so spurningurin, um Mjølnir detta í somu grøvina, ella um tær megna at taka stikkið heim. Gaman í eru ikki allar súður syftar, um Mjølnir, men tað skal ikki roknast við, at tær fara at kiksa í øðrum dystum, so fyri leikararnar man hetta í nógvar mátar vera at rokna sum gulldystur.

TB spælir um sama mundi á Kambsdali móti ÍF, og sum so eru ikki teir stóru valmøguleikarnir hjá TB. Tær skulu bara syrgja fyri at vinna sínar dystir og annars bíða eftir Mjølni. Og tó at ÍF onkra tíð hevur argað, so eigur góðskan á TB liðnum at vera somikið góð, at hetta ikki verður enn ein snávingarsteinur hjá teimum.



*Vinna kvinnurnar hjá Mjølnir útidystin á Drátti, tykist FM-gullið vera at kalla víst*

### Barometrið í Sørvági

Hjá monnunum er somuleiðis spenningur í luftini, tá Mjølnir vitjar hjá SÍ.

Her er gullið kanska ikki eins nær, tí Mjølnir skal á seinasta leikdegi vitja hjá ÍF, og tí kann hesin dysturin ikki sigast at vera avgerandi fyri oddastríðið, soleiðis sum vit av misgávum skrivaðu seinasta týsdag..

Men tað skerst ikki burtur, at hetta er eitt gott barometur hjá Mjølni at máta styrkina eftir, nú stórdysturin móti ÍF nærkast í hvørjum. ÍF vann seinsta vikuskifti 3-0 í Sørvági, og tó at fleiri ferðir rann um snarið í tí dystinum, so vísti seinasta settið kanska, at SÍ ikki í nóg stóran mun megnar at halda dampinum gjøgnum heilan dyst. Júst tann eginleikin er nakað, sum Mjølnir hevur sýnt nógv av í árinum, og so er spurningurin, hvørt teir einaferð afturat prógvað, at so er.

Hin dysturin hjá monnunum verður í Havn, har Fleyr skal royna at vinna sær næsta sigurin á árinum, tá teir hesaferð eiga heimavøll móti Fram. Hesi bæði liðini hava í ár ikki havt nakað at siga í oddinum, og tí man dysturin einamest snúgva seg um, hvør skal arga hvønn í høvuðsstaðnum komandi summarið.

# Óli stillar upp

**Hósdagin varð greitt, at Óli Holm fer at taka dystin upp við Fritleif Olsen um formanssessin í Fótbóltssambandinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Millum lítið og einki hevur verið at hoyrt um formansvalið í FSF, síðani aðalfundurin fyri nakað síðani samtykti, at nevndarvalið skuldi útsetast. Hetta hendi eftir áheitan frá VB, og nú nýggja freistin fyri at seta fram valevni til formanssessin er um at vera runnin, er tað ein vágbingur, sum er koyrdur fram sum mótevni til Fritleif Olsen.

Dimmalætting staðfesti í gjár, at Óli Holm, sum er pápi verandi VB-formannin, er skotin upp av Sumbingum, og soleiðis tykist tað nú standa greitt, at talan verður um stríðsval. Eitt stríðsval, sum væl kann vísa seg at gerast eitt val millum teir »gomlu« í FSF og teir meira fesku, sum seinnu árini hava ognað sær eitt alt størri vald í felagsskapinum.



*Eftir at lítið og einki hevur verið at hoyrt um FSF-aðalfundin nú í eina tíð, fer tað ivaleyst at skapa nakað av røringi, nú navn er sett á kappingarneytan hjá Fritleifi Olsen*

### Gamal i garði

Óli er nevnliga ein av teimum nevndarlimunum í FSF, sum hava sitið heilt leingi, og hetta kom eisini til sjóndar, tá hann ikki var ein av teimum nevndarlimunum, sum vóru við til at senda fyrrverandi – ella skuldu vit kanska sagt fráfarandi – formanninum, Dánjali Andreasen, eitt sera hvassorðað bræv, sum í seinasta enda helst var við til at fella Dánjal.

Onkur hevur tikið til, at hann kanska hevur »dekan ov nógvar royndir« innan FSF, og verður her helst sipað til stóru útskiftingina, sum hevur verið í felagsskapinum seinnu árini.

Tað man tó vera lítil ivi um, at Óli hevur møguleikan at verða valdur. Gjøgnum árini hevur hann ivaleyst knýtt samband við leiðslurnar í nógvum feløgum, og í øllum førum kennir hann felagsskapin væl innanífrá mótvegis Fritleifi, og so er spurningurin, hvørt hetta verður roknað sum fyrimunur ella ikki.

### Minstukrøv fylla nógv

Enn er tó helst ov tíðliga at siga, í hvønn mun tey bæði valevnini fáa uppbakning frá ymsu feløgunum.

Sumbingar hava sjálvandi kanna sær lendið nakað, áðrenn teir hava heitt á vágbingin um at koma í uppskot, og tá teir so hava tikið avgerðini, munnu vónirnar ikki vera heilt ongar í so máta.

Sum vit hava skilt støðuna, so eru tað tó enn fleiri feløg, sum ikki rættiliga hava gjørt av, hvussu teirra atkvøða skal falla á aðalfundinum. Fremsta orsøkin til hetta munnu vera minstukrøvini til feløgini, sum vórðu samtykt á aðalfundinum. Feløgini skulu innan týsdagin handa FSF eina ætlan, har tey staðfesta, hvussu hesi krøv verða uppfylt, og tí hava flestu formenninir kring landið helst úr at gera hetta fram til týsdagin. Men tað er eingin ivi um, at tá hetta arbeiðið er av, fara telefonirnar at kima kring landið. Rekast skal bæði væl og virðiliga, og halda báðir partarnir seg til fram til valdagin, so er einki at ivast í, at talan væl kann gerast um eitt sera spennandi val.

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

1. deild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 06.03 | 14.30 | Neistin-VB |
| | | Hannis Wardum & Uni Wardum |
| 07.03 | 15.00 | Stjørnan-Kyndil |
| | | Kristian Johansen & Sámal Hansen |
| 07.03 | 16.00 | Søljan-StÍF |
| | | Karsten Joensen & Kristian Joensen |

1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 06.03 | 16.00 | Neistin-KÍF |
| | | Hannis Wardum & Uni Wardum |
| 07.03 | 16.00 | H71-VÍF |
| | | Geir Wardum & Gunnar Gregoriussen |

**Flogbóltur**

Meistaradeild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 07.03 | 14.00 | ÍF-TB |
| | | KÍF |
| 07.03 | 14.00 | Dráttur-Mjølnir |
| | | Jan Hentze & Tummas Óli Mortensen |

Meistaradeild menn

| | | |
|---|---|---|
| 07.03 | 16.00 | Fleyr-Fram |
| | | ÍF |
| 07.03 | 16.00 | SÍ-Mjølnir |
| | | Jan Hentze & Tummas Óli Mortensen |

## Hondbóltsstøðurnar

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 8 | 7 - 0 - 1 | 547 | 415 | 132 | 25 |
| 2 | VB | 7 | 7 - 0 - 0 | 529 | 392 | 137 | 22 |
| 3 | VÍF | 8 | 5 - 0 - 3 | 517 | 426 | 91 | 19 |
| 4 | Neistin | 6 | 3 - 0 - 3 | 452 | 416 | 36 | 14 |
| 5 | StÍF | 8 | 2 - 0 - 6 | 465 | 542 | -77 | 9 |
| 6 | Søljan | 7 | 1 - 0 - 6 | 361 | 480 | -119 | 4 |
| 7 | Kyndil | 8 | 1 - 0 - 7 | 338 | 538 | -200 | 3 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kyndil | 6 | 3 - 1 - 2 | 481 | 449 | 32 | 16 |
| 2 | Neistin | 5 | 4 - 0 - 1 | 427 | 392 | 35 | 14 |
| 3 | StÍF | 6 | 3 - 0 - 3 | 413 | 390 | 23 | 13 |
| 4 | VÍF | 5 | 3 - 0 - 2 | 412 | 376 | 36 | 12 |
| 5 | H71 | 5 | 1 - 1 - 3 | 370 | 428 | -58 | 5 |
| 6 | KÍF | 5 | 1 - 0 - 4 | 392 | 460 | -68 | 5 |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 17 | 14 - 3 | 45 | 16 | 29 | 20 |
| 2 | TB | 17 | 13 - 4 | 44 | 15 | 29 | 18 |
| 3 | Dráttur | 17 | 10 - 7 | 37 | 26 | 11 | 16 |
| 4 | ÍF | 17 | 7 - 10 | 25 | 33 | -8 | 10 |
| 5 | KÍF | 18 | 7 - 11 | 25 | 44 | -19 | 9 |
| 6 | Fleyr | 18 | 1 - 17 | 11 | 53 | -42 | 1 |

**Meistaradeild, menn**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 14 | 12 - 2 | 38 | 9 | 29 | 17 |
| 2 | Mjølnir | 13 | 12 - 1 | 36 | 8 | 28 | 17 |
| 3 | SÍ | 14 | 7 - 7 | 26 | 24 | 2 | 10 |
| 4 | Fram | 14 | 2 - 12 | 10 | 37 | -27 | 2 |
| 5 | Fleyr | 13 | 1 - 12 | 5 | 37 | -32 | 2 |